# Sansir søkja 3 starvsfólk








Sansir søkja samskipara/ráðgeva

## Tak tær væl av okkara kundum

Ein kampanja skal leggjast til rættis, og ein miðlaætlan skal leggjast fyri sjónvarp, útvarp og bløð. Faroe Islands Tourist Guide og Atlantic Review skulu hava greinar og lýsingar. Eitt útkast skal gerast til faldara, myndir skulu finnast og takast, og týska umsetingin skal fáast til vega.

Mongu og fjølbroyttu uppgávurnar á Sansum krevja ein væl skipaðan og nærlagdan samskipara, sum hevur skil fyri marknaðarføring og eitt gott eyga fyri smálutum. Tað kundi verið tú!

Umframt arbeiði sum samskipari, skal tú vera før/ur fyri at tosa við okkara viðskiftafólk um, hvussu teirra vøra ella tænasta best verður marknaðarførd. Tú skrivar væl føroyskt og samskiftir lættliga á donskum og enskum. Tú hevur eina hægri útbúgving innan sølu og samskifti ella hevur arbeitt innan økið.

Tú kemur at arbeiða í einum samskiftis- og tøknihúsi, sum hevur nakrar av teimum størstu og fremstu virkjunum í Føroyum í sínum kundaskara. Vit gera størri og smærri lýsingaátøk. Vit gera bløð, faldarar og aðrar prentlutir. Vit hava ment eina sera brúkaravinarliga CMS-heimasíðuskipan til internetið. Og vit hava okkara egna skeltaverkstað. Í løtuni starvast 18 fólk á Sansum, sum eru í støðugum vøkstri.

Ljóðar samskiparin sum eitt starv fyri teg, so send eina umsókn við viðkomandi tilfari til:

Sansir søkja fyriskipara

## Fá skil á mongu træðrirnar

Sansir søkja eftir einum væl skipaðum fyriskipara.

Uppgávan fevnir um at leggja arbeiði til rættis innanhýsis, at betra um arbeiðsgongdir og at tryggja, at arbeiðsorkan verður gagnnýtt so væl sum gjørligt í húsinum. Tað hevur m.a. við sær at gera hagtøl fyri tímanýtslu og eftirkalkulatiónir.

Samstundis skal fyriskiparin røkja samstarvið við okkara veitarar, fáa tilboð til vega og tryggja okkum, at arbeiðini eru í lagi og verða veitt rættstundis.

Á Sansum starvast í løtuni 18 fólk. Vit eru eitt samskiftis- og tøknihús, ið leggur stóran dent á at kenna okkara samstarvsfelagar væl, so kunningin og marknaðarføringin samsvara við teirra samleika.

Tú verður ein lyklapersónur í fyritøkuni, sum er nógv vaksin eftir stuttari tíð. Tú heldur skil á teimum mongu træðrunum og syrgir fyri, at arbeiði verða gjørd skynsamt og úrslitagott.

Tú hevur hægri útbúgving ella royndir á økinum.

Tað snýr seg um logistikk og samskifti. Tú stýrir arbeiðsgongdunum og dugir væl at tosa við fólk við tí fyri eyga at tæna heildini, so eitt gott úrslit fæst burturúr.

Er tað ein fragd at fáa tingini at virka? Send so eina umsókn við viðkomandi skjølum til:

Sansir søkja

## Samband við skapandi sniðgeva

Sansum tørvar ein skapandi sniðgeva. Tú ert originalur og virkin, hevur evnini at koma við góðum hugskotum og dugir at finna røttu loysnina til høvið. Umframt at tekna við hond dugir tú eisini at arbeiða við Illustrator, Photoshop ella InDesign.

Útbúgving er ein fyrimunur, men eingin treyt, og vit leggja dent á tínar royndir. Tú hevur staðið fyri at gera kunningartilfar, sum er vent ímóti virkjum, og tilfar, sum vendir sær beinleiðis til brúkarar. Á Sansum kemur tú m.a. at standa fyri lýsingaátøkum, sniðgeving til internet og blaðið Kvinnu.

Sansir eru eitt samskiftis- og tøknivirki. Vit leggja stóran dent á at kenna okkara samstarvsfelagar til lítar, so okkara kunning og marknaðarføring samsvarar við teirra mentan og samleika. Hesin eginleiki hevur gjørt, at vit hava vunnið álit í føroyskum vinnulívi. Vit hava eisini ment okkara egnu heimasíðuskipan, og vit stremba eftir at fáa fótin fastan á útlendska marknaðinum.

Á Sansum starvast eitt sterkt lið av fólkum, ið setir høg krøv til dygdina á tí, ið verður latið úr hondum. Hevur tú hug at gerast ein partur av hesum liði, sum skapandi sniðgevi, kanst tú senda eina umsókn við viðkomandi skjølum til:

Send umsóknina til:
Sansir, Tinghúsvegur 47, Postboks 1099, FO-110 Tórshavn ella hognir@sansir.fo.
Seinasta freist at søkja størvini er 1. august 2005.
Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at skriva til Høgna á hognir@sansir.fo ella ringja 220 401.

SANSIR

Postboks 1099, FO 110 Tórshavn, tel 355 355, faks 355 350, www.sansir.fo, info@sansir.fo